## Summarfrí

Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí, frá mánadegi 6. august. Opið verður aftur mánadagin 27. august.

**Havnar Handverkarafelag**

Til handlarnar við Hoyvíksvegin og Gripsvegin verður søkt eftir fyrikomandi

## Ekspeditrisu

Arbeiðið fevnir um skiftandi vaktir uml. 30 tímar um vikuna.

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Andreu.

BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 22 51 60 ella 31 21 61

## Starlet 29

### útróðrarbátur

Við øllum nautiskum tólum, línuspæli, 5 elektroniskum snellum frá Oilwind. Motorur Perkins 120 hk. Til sølu. Báturin er í sera góðum standi. Boð undir kr. 400.000,- ongan áhuga.

Nærri kann fáast at vita við at ringja tlf. 332379.

## Víkingur 900

### Framúr útróðrarbátur

Longd 9,60 m, breidd 3,40 m við stórari last, 12 stk. 350 l kassar. Motorur Cummins 300 hk. Til sølu uttan fiskiloyvi. Báturin er eisini væl egnaður til alivinnu og ferðafólkaflutning. Boð undir kr. 500.000,- ongan áhuga.

Nærri kann fáast at vita við at ringja tlf. 332379.

## Høli til leigu

Kjallarin á Sosialinum er til leigu. Hølini eru slakar 100 fermetrar til víddar, inngongd er til hølini frá parkeringsøkinum niðan fyri húsini og parkeringsviðurskiftini eru góð. Nærri fæst at vita við at ringja til Sosialin 311820 ella 216409.

**Sosialurin**

## Aðalfundur

Lýst verður til aðalfundar í Listafelag Føroya hósdagin 23. august 2001 kl. 17.00.

Skrá:
- Nevndarfrágreiðing
- Framløga av ársroknskapi felagsins
- Nevndarval
- Val av grannskoðarum
- Ymiskt

**Listafelag Føroya**
Box 1141 - FO 110 Tórshavn
Telefon 313579

## Barrfólk og servitrisa

Søkt verður eftir barrfólki og servitrisu at byrja skjótast gjørligt.

Løn eftir avtalu.

Rio-Bravo Restaurant
Tlf. 319767 ella 219696

## Skrivstovufólk

Á Dómaraskrivstovuni verður søkt eftir fólki við hollari skrivstovuútbúgving til setan tann 1. september 2001.

Talan er um eitt starv við niðursettari arbeiðstíð – 30 tímar um vikuna.

Viðkomandi verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, ella Niels Tang Christensen, rættarassessor, tlf. 311003.

Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 17. august 2001.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
*tann 27. juli 2001*
**Niels Tang Christensen**
**ra.**

## Mýrusýra

Mýrusýra er at fáa frá Kemilux.

KEMILUX®
Mykinesgøta 1
Tlf. 310833

## Serskeið á Søgu- og Samfelagsdeildini

**Í heyst bjóða vit undirvísing í hesum skeiðum:**

**Føroyskur politikkur**
*rar Jógvan Mørkøre, cand.mag*
*a hósdagar kl. 10.35-12.15 á Sjómansskúlanum*

**Nationalisma og etnisitetur**
*rar Firouz Gaini, cand.scient.anth*
*a mikudagar kl. 12.45-14.25 á Sjómansskúlanum*

**Demokrati sum hugtak og hugsjón**
*rar Jóanes N. Dalsgaard, BA (í samstarvi við Jógvan Mørkøre)*
*a hósdagar kl. 12.45-14.25 á Sjómansskúlanum*

**Løgtingssøgan**
*rar Hans Andrias Sølvará, cand.mag*
*a týsdagar kl. 10.35-12.15 á Sjómansskúlanum*

**Oljuvinnan – samfelagsligu árinini**
*rar Suni á Dalbø, cand.scient.soc*
*a mánadagar kl. 12.45-14.30 á Sjómansskúlanum*

**Økismenning**
*rar Gestur Hovgaard, Ph.D. og Richard Apostle, professari í sosiologi/antropologi*
*a mikudagar kl. 10.35-12.15 á Sjómansskúlanum*

**Búskaparfrøði II**
*rar Ólavur Christiansen, cand. polit & scient. soc*
*a týsdagar kl. 12.45-15.15 á Sjómansskúlanum*

**Galdandi fyri øll skeið:**
Tey eru fyrst ætlaði lesandi, ið eru komin nakað áleiðis í lesnaði við lærdum háskúla, og lidnum kandidatum við áhuga fýri at leggja aftrat vitan síni. Undirvísing og prógvtøka er treytað av at nóg nógv tekna seg. Skeiðini eru uppá 15 dupulttímar tilsamans, ið svarar til 1/4 lestrarár ella 15 ECTS (undantikið "Búskaparfrøði II", ið telur 7,5 ECTS).

**Umsóknarfreistin er 15. august 2001**

**Umsóknarbløð og upplýsingar um skeiðini fáast við at venda sær til**

Frøðskaparsetur Føroya
**Søgu- & samfelagsdeildina,**
J.C. Svabos gøtu 7,
100 Tórshavn,
tlf. 317009.
ssd@setur.fo

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúðleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilikt
Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820

ítróttur
Nr. 146 • hósdagur • 2. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heidi vann gull

*Heidi Andreasen, vinstrumegin, Katrin Johansen og Esther Gaard Hansen eru í hesum døgum í Svøríki, har EM í svimjing fyri rørslutarnað verður hildið*

**ÍSB-svimjararnir hava vunnið síni fyrstu heiðursmerki í EM-kapping, sum verður hildin í Stockholm**

SVIMING
*Eyðun Klakstein*

Týskvøldið vann ÍSB-svimjarin, Heidi Andreasen, tvey heiðursmerki í Europameistaraskapinum fyri rørslutarnað, sum verður hildin í Stockholm í hesum døgum.

Heidi vann gull í 100 metrar frí, og í hesi kapping betraði hon persónliga metið við einum sekundi.

Í kappingini 100 metrar rygg vann Heidi bronsu, meðan hin føroyski svimjarin, Esther Gaard Hansen, gjørdist nummar 5.

– Hvørki eg ella Heidi betraðu okkara persónliga met í hesari kappingini, so vit eru ikki heilt nøgdar við úrslitið, sigur Esther Gaard Hansen.

### Ræður um at betra seg

Esther og Heidi skulu luttaka í fleiri kappingum í hesi vikuni, og í gjárkvøldið vónaði Esther, at hon fór at vinna eitt heiðursmerki.

– Eg skal kappast í 100 metrar firvald, og eg vóni, at eg kann vinna eina gull ella silvurmedalju, segði hon stutt fyri middag í gjár.

– Tað, sum mest ræður um, er at betra okkum alla tíðina, og so fáa vit at síggja, um vit vinna fleiri heiðursmerki.

### Fyrireikað seg á Sicilia

Áðrenn EM-kappingina í Svøríki vóru føroysku svimjararnir á venjingarlegu á Sicilia.

– Tað fingu vit nógv burturúr. Umstøðurnar vóru sera góðar, og vit vandu okkum við at svimja í 50 metra hyli. Eingin slíkur hylur er í Føroyum, so tað er gott at kunna venja í einum sovorðnum hyli áðrenn eina kapping, sigur Esther Gaard Hansen.

Umframt báðar svimjararnar er Katrin Johansen, venjari, og ein fysioterapeutur við á ferðini í Svøríki.

Føroyska ferðalagið verður aftur í Føroyum mánadagin.

## Nýggir spælarar skulu royna seg

*Hjalgrím Elttør hjá KÍ er ein av spælarunum, sum fer við U19 landsliðnum til Wales at spæla vinardystir*

**Venjarin hjá U–19 landsliðnum, sum mánadagin fer til Wales, dregur nýggju møguleikarnar fram, eftir at fleiri lyklaspælarar hava givið avboð**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

U–91 landsliðið fer mánadagin til Wales, har teir týsdagin og hósdagin skulu spæla vinardystir ímóti Wales.

Jógvan Martin Olsen hevur úttikið átjan spælarar til ferðina. Liðið eigur fyrst og fremst at vera grundað á 1983 árgangin. Men umstøðurnar hava havt við sær, at venjarin hevur valt at taka fleiri yngri spælarar enn so við til Wales.

Onkrir av teimum, sum áður hava verið á landsliðnum hjá hesum árganginum, eru givnir, og tríggir av teimum, sum undanfarin ár hava verið lyklaspælarar á hesum liðnum, hava givið avboð til ferðina niður til Wales. Talan er um Jón Róa Jacobsen og Vagnur Mohr Mortensen úr HB og um Símun Joensen úr KÍ. HB menninir skulu annað hóskvøld spæla í Europa Cup, og KÍ spælarin fer í komandi viku yvir til USA, har hann skal vera tað mesta av einum ári.

– Tað er harmuligt, at vit ikki hava allar spælararnar tøkar. Men støðan ber møguleikar við sær hjá øðrum at vísa, hvør dugur er í teimum. Tríggir av spælarunum, sum í hesi vikuni eru í NM kappingini fyri U–17 landslið í Vejle (fyrsti dysturin varð spældur í gjár, eftir at blaðið var farið til prentingar), skulu við til Wales, og so eru tað onkrir spælarar, sum ikki hava verið á landsliðnum áður, men sum í ár hava tikið seg rættuliga nógv fram, sigur Jógvan Martin Olsen, og sipar í hesum sambandi m. a. til Heina í Skorini, sum í summar er komin í 1. liðs hópin hjá B36.

Teir átjan spælararnir, sum fara til Wales, eru Pól Næs Joensen, B36, og Heini Jacobsen, VB, sum eru málverjar, og útispælararnir eru Marni Djurhuus, EB/Streymur, Atli Danielsen, KÍ, Áki L. Hansen, NSÍ, Áki Petersen, ÍF, Bjarni Jørgensen, HB, Rókur av Fløtum Jespersen, HB, Jann Ingi Petersen, B68, Kaj Ennigarð, GÍ, Hjalgrím Elttør, KÍ, Fróði Jóannesarson, NSÍ, Kári í Lágabø, VB, Sólbjørn Olsen, B36, Gilli Haraldsen, Frederikshavn, Heini í Skorini, B36, Mortan Johannesen, B36 og Rasmus Nolsøe, TB.

Ferðalagið fer úr Føroyum og til Aberdeen mánadagin. Teir skulu koyra í bussi niður til Wales. Fyrri dysturin er á skránni týsdagin, og tann seinni verður spældur hósdagin.